LØGTINGSINS
UMBOÐSMAÐUR

Tórshavn, tann 3. juni 2015
J.Nr.: LUM-80- 15/00072-31
(at tilskila í svari)
Tykkara J.nr.

**Viðv. setan av fulltrúa í uttanríkistænastuni í Løgmansskrivstovuni**

Við skrivi, dagfest 4. mai 2015, boðaði eg frá, at eg umhugsaði at taka málið um setan av fulltrúa í uttanríkistænastuni í Løgmansskrivstovuni til viðgerðar og bað Vinnumálaráðið um at læna mær skjølini í málinum. Av tí, at løgmansstjórin var ógegnig at viðgera málið, hevði Vinnumálaráðið viðgjørt og tikið avgerð í málinum.

Heimildin fyri at taka málið til viðgerðar er at finna í § 6, stk. 5 í umboðsmanslógini, sum heimilar umboðsmanninum av sínum eintingum at taka mál til viðgerðar og gera neyðugar kanningar í hesum sambandi.

Sum grundarlag vísti eg á eina grein á einum netmiðli, har sagt varð, at persónur við tøttum tilknýti til løgmansstjóran (A) var sett í starvið, samstundis sum fleiri aðrir umsøkjarar vóru til starvið, harímillum ein, sum hevði verið fyribilssettur í starvinum síðani á sumri 2011.

Eg móttók skjølini í málinum tann 8. mai 2015, og eftir at hava lisið tey boðaði eg í skrivi, dagfest 18. mai 2015, frá, at eg hevði gjørt av at taka málið til viðgerðar. Umframt at kunna Løgmansskrivstovuna um hetta, kunnaði eg eisini tveir av umsøkjarunum um avgerð mína. Tí, sum Vinnumálaráðið hevði gjørt av at seta í starvið, og tí, sum var fyribilssettur í starvinum.

Í fyrstu atløgu metti eg tørv vera á at fáa lýst tveir tættir í málinum. Hesir snúðu seg um útbúgvingarkravið í starvslýsingini og luttøkuna hjá einum deildarstjóra og einum ráðgeva á Løgmansskrivstovuni í setanarbólkinum. Eg bað tí Vinnumálaráðið um at greiða mær nærri frá hesum viðurskiftum. Hesa frágreiðing móttók eg tann 28. mai 2015.

Við støði í skjølunum í málinum og frágreiðingini hjá Vinnumálaráðnum havi eg gjørt av at viðgera spurningin um útbúgvingarkravið, umframt grundarlagið undir seinna setanartilmælinum og viðgerðina hjá Vinnumálaráðnum av sjálvum setanartilmælinum.

Ítøkiliga havi eg ikki hildið grundarlag verið fyri at gera meira við spurningin um luttøkuna hjá tveimum starvsfólkum í uttanríkistænastuni í setanarbólkinum.

undir Bryggjubakka 11 • Postrúm 2008 • FO-110 Tórshavn • Tlf. 358500 • Faks 358501 • lum@lum.fo • www.lum.fo

*Fyrra setanartilmælið, dagfest 19. mars 2015*
Starvið sum fulltrúi í uttanríkistænastuni í Løgmansskrivstovuni varð lýst leyst at søkja við umsóknarfreist tann 16. februar 2015. Starvslýsingin var m.a. soleiðis orðað:

> "...
> Tann, ið verður settur í starvið, fær sum høvuðsuppgávu at samskipa føroysku luttøkuna í norðurlendska samstarvinum, men kemur eisini at fáa aðrar uppgávur í uttanríkistænastuni, eins og starvsinnihaldið kann væntast at verða broytt sum frá líður.
> ...
> **Førleikakrøv**
> Kravt verður, at umsøkjarin hevur:
>
> - kandidatútbúgving frá hægri lærustovni innan diplomati, løgfrøði, samfelagsfrøði, búskaparfrøði ella aðra viðkomandi útbúgving.
>
> Umsøkjarar við øðrum akademiskum útbúgvingum, sum hava viðkomandi arbeiðsroyndir og gott innlit í uttanríkisøkið, kunnu eisini søkja.
>
> **Persónlig førleikakrøv og royndir**
> Umráðandi er, at tann, ið settur verður:
>
> - hevur hollar arbeiðsroyndir
> - hevur góð samstarvsevni
> - hevur góð sundurgreiningarevni
> - hevur góðar samskiftisførleikar, bæði munnlig og skrivliga
> - hevur politiskt tev,
> - er tænastuhugaður og fleksibul, miðvísur og dugur at arbeiða sjálvstøðugt.
>
> Umsøkjarar skulu eisini hava diplomatiskan sans, hava evni at hugsa strategiskt, eins og duga at samskifta á ymsum stigum. Tað er fyrimunur, at umsøkjarar hava innlit í almennu fyrisitingina og uttanríkisøkið og hava royndir í at samráðast.
> ..."

42 umsóknir vóru til starvið. At viðgera umsóknirnar og gera tilmæli til aðalstjóran í Vinnumálaráðnum at taka støðu út frá, varð settur ein setanarbólkur við tveimum embætisfólkum úr Vinnumálaráðnum og tveimum úr uttanríkistænastuni í Løgmansskrivstovuni.

Fleiri av umsøkjarunum luku førleikakrøvini, soleiðis sum hesi vóru orðað í starvslýsingini, og tí gjørdi setanarbólkurin í fyrstu atløgu av at taka umsøkjarar við kandidatútbúgving framum. Harumframt varð dentur lagdur á persónligu førleikakrøvini og royndirnar í starvslýsingini. Umframt hetta var semja um at velja út frá hollum arbeiðsroyndum eftir lokna útbúgving. Úrslitið av hesi bólking var, at 6 umsøkjarar vórðu bodnir til setanarsamrøðu. A og B vóru millum teirra, sum vóru mett at vera skikkað til starvið.

Setanartilmælið, sum er dagfest 19. mars 2015, var einmælt og er soleiðis orðað:

> "...
> **Tilmæli**
> Út frá eini heildarmeting heldur setanarbólkurin, at B er best skikkaður til starvið sum fulltrúi á Løgmansskrivstovuni.
> Setanarbólkurin mælti til at seta B í fast starv sum fulltrúi á Uttanríkistænastuni.
> Tilmælið er grundað á,
>
> - at hann lýkur kravið í lýsingini til útbúgving,

- hevur eina væl skrivaða umsókn,
- grundgav væl fyri, hvussu hansara fakligu førleikar kunnu gagnnýtast í starvinum,
- hevur góðar málførleikar, umframt
- at hann hevur hollar royndir á økinum, serstakliga viðvíkjandi norðurlendskum samstarvi."

Seinni sama dag verður setanarbólkurin kunnaður um, at aðalstjórin í Vinnumálaráðnum hevur góðtikið tilmælið. Hetta er eisini noterað av aðalstjóranum á sjálvt tilmælið.

*Uppafturtøka av viðgerðini av setanartilmælinum - útbúgvingarkravið*
Tá avgerðirnar í málinum skuldu skrivast, varð komið eftir, at B hevði ikki eina kandidatútbúgving, og aðalstjórin gjørdi av at útseta málið.

Um hálvan apríl spyr Vinnumálaráðið útbúgvingarstovnin, sum hevur útskrivað prógvið, á hvørjum stigi útbúgvingin er. Svarað verður, at útbúgvingin í minsta lagi svarar til eina bachelor útbúgving. Sama dag hevur setanarbólkurin fund, og sambært samskiftinum seinni sama dag og dagin eftir verður viðgerðin av setanartilmælinum tikin uppaftur. B er sambært skjølunum ikki longur upp á tal til starvið.

Sambært frágreiðingini, sum eg havi fingið frá Vinnumálaráðnum um málið, samanborið við skjølini í málinum, tykist eitt sindur av ógreiðu vera um, hvørja støðu ráðgevin og deildarstjórin í Løgmansskrivstovuni í setanarbólkinum høvdu til, hvørjar avleiðingar nýggju upplýsingarnar áttu at hava fyri setanartilmælið. Greitt er tó, at í øllum førum umboðini hjá Vinnumálaráðnum í setanarbólkinum eftir hetta út frá eini heildarmeting ikki longur mettu B vera best skikkaðan til starvið og innstilla A og D til starvið sum ávikavist nr. 1 og 2.

Av tí, at eg helt, at tað kundi tykjast sum, at setanarbólkurin broytti viðgerðina og tilmælið vegna tað, at B ikki hevði eina kandidatútbúgving, heitti eg í skrivi, dagfest 8. mai 2015, á Vinnumálaráðið um at greiða mær frá sínum sjónarmiðum. Eg spurdi, hvussu orðingin í starvslýsingini "aðra akademiska útbúgving" í mun til kravið um kandidatútbúgving skuldi skiljast, herundir um ein bachelor-útbúgving er at meta sum ein akademisk útbúgving, og um umsøkjari við bachelor-útbúgving í útgangsstøðinum lýkur kravið um útbúgving í starvslýsingini.

Um útbúgvingarkravið skrivar Vinnumálaráðið soleiðis í skrivi til mín, dagfest 28. mai 2015:

> "Orðingina í starvslýsingini "aðra akademiska útbúgving" í mun til kravið um kandidatútbúgving hevur Vinnumálaráðið lisið soleiðis, at orðingin fevnir eisini um bachelorar, men at hendan útbúgvingin, í mun til kravið um kandidatútbúgving, isolerað sæð hevur minni tyngd í metingini av førleikakrøvunum, men sum kann kompenserast við viðkomandi arbeiðsroyndum og góðum innliti í uttanríkisøkið. Stendur valið t.d. millum tveir umsøkjarar, har annar er kandidatur og hin bachelor innan fyri sama øki, og báðir við viðkomandi arbeiðsroyndum og góðum innliti í uttanríkisøkið, fellur avviganin sostatt út til fyrimuns fyri umsøkjaran við kandidatútbúgving.
> Setanarbólkurin var tí eisini samdur um, at eftir lýsingini luku umsøkjarar við kandidatútbúgving og umsøkjarar við øðrum akademiskum útbúgvingum, heruppií bachelor

> útbúgving, sum høvdu viðkomandi arbeiðsroyndir og gott innlit í uttanríkisøkið, førleikakrøvini í lýsingini. ...”

Sambært hesum metir Vinnumálaráðið umsøkjara við bachelor-útbúgving, og sum hevur viðkomandi arbeiðsroyndir og gott innlit í úttanríkisøkið, í útgangsstøðinum at lúka førleikakrøvini í starvslýsingini. Hetta kann ikki skiljast øðrvísi enn, at B, sum setanarnevndin einmælt mælti til at seta í starvið í útgangsstøðinum framvegis varð mettur at lúka starvstreytirnar. Hóast hetta vísir málsgongdin, at viðgerðin av setanartilmælinum verður tikin uppaftur, uttan at B í fyrstu atløgu er upp á tal til at verða settur í starvið.

Í frágreiðing frá fundi í setanarbólkinum 16. apríl 2015, sum er endurgivin í seinna setanartilmælinum, stendur soleiðis:

> “Nýggju upplýsingarnar vórðu viðgjørdar. Setanarbólkurin valdi hereftir at innstilla annan umsøkjara til (fasta) starvið.”

Seinni boða umboðini hjá Løgmansskrivstovuni tó frá, at tey halda fast við tilmælið um at seta B í starvið. Grundgevingin er, at drúgvar og viðkomandi royndir gera hann best skikkaðan til starvið, eisini hóast hann ikki hevur eina kandidatútbúgving.

Tað tykist lítil ivi vera um, at tveir limir í setanarbólkinum velja at síggja burtur frá B sum møguligt evni til starvið, og at orsøkin til hetta má vera tað faktum, at hann ikki hevur eina kandidatútbúgving.

Eg meti eisini grundgevingina hjá Vinnumálaráðnum í skrivi til B, dagfest 30. apríl 2015, stuðla míni fatan. Har verður sagt, at mett varð ikki, at hansara útbúgving stóð mát við útbúgvingina hjá hinum umsøkjarunum, ið vóru til samrøðu, og at dentur í hesum sambandi varð lagdur á, at tann, sum skuldi setast, eisini skuldi kunna røkja aðrar uppgávur í uttanríkistænastuni. Sambært skjølunum í málinum og frágreiðingini hjá Vinnumálaráðnum varð dentur lagdur á hetta frá byrjan av, og tí var hetta eisini ein partur av grundarlagnum undir fyrra setanartilmælinum, tá ein samdur setanarbólkur mælti til at seta B í starvið.

Eg havi ikki serligar fortreytir fyri at meta um fakliga førleikan hjá umsøkjarunum og harvið, hvør er best egnaður at seta í starvið sum fulltrúi í uttanríkistænastuni í Løgmansskrivstovuni. Eg fari tí heldur ikki inn í eina nærri viðgerð av hesum. Men er talan um heilt serligar umstøður, kann eg finnast at viðgerð og avgerðum hjá myndugleikunum.

Vísandi til viðmerkingar mínar omanfyri um útbúgvingarkrøvini í starvslýsingini haldi eg tað vera ein feil í viðgerðini, at setanarbólkurin eftir øllum at døma velur at síggja burtur frá B einans grundað á, at hann ikki hevur eina kandidatútbúgving og uttan samstundis at meta, um royndir hansara og innlit í uttanríkisøkið uppviga fyrimunin, sum eitt kandidatprógv verður mett at hava.

Um frágreiðingin hjá Vinnumálaráðnum skal skiljast sum ein grundgeving fyri, at B ikki hevði fingið í boði at komið til setanarsamrøðu, um so var, at setanarbólkurin beinanvegin var greiður um, at B ikki hevði eina kandidatútbúgving, skal eg viðmerkja, at

eg haldi tað hevði verið ósakligt ikki at bjóða honum til setanarsamrøðu av hesi orsøk. Hetta grundi eg á, at B hevði røkt starvið í hálvtfjórða ár, hann hevði eina akademiska útbúgving, umframt at hann sambært starvslýsingini hevði ein fyrimun við sínum royndum og innliti í uttanríkisøkið.

*Seinna setanartilmælið, dagfest 30. apríl 2015*
Í seinna setanartilmælinum mæla umboðini hjá Vinnumálaráðnum til í fyrsta lagi at seta A og í øðrum lagi D.

Umboðini hjá Løgmansskrivstovuni mæla í fyrsta lagi til at halda fast við upprunaliga tilmælið at seta B í starvið og í øðrum lagi A.

Aðalstjórin í Vinnumálaráðnum ger sama dag av at fylgja tilmælinum hjá umboðunum í Vinnumálaráðnum og seta A í starvið. Tilskilað verður, at avgerðin er tikin við somu grundgevingum.

Setanartilmælið hjá umboðunum hjá Vinnumálaráðnum er grundað á, at A hevur eina viðkomandi útbúgving sum cand. jur., góð úrslit og viðkomandi fak á útbúgvingini, fleiri førleikagevandi størv í lestrartíðini, royndir frá størvum innan almennu fyrisitingina, kláraði seg væl til samrøðuna, hevði góðar málførleikar og persónligum eginleikum.

Sambært skjølunum í málinum gera umboðini hjá Løgmansskrivstovuni vart við, at um starvsroyndir hjá A í lestrartíðini skulu takast við í metingina, eiga eisini aðrir umsøkjarar, sum av ymsum orsøkum ikki vórðu tiknir við í viðgerðina av fyrstan tíð, at verða vigaðir í mun til hetta. Víst verður eisini á ítøkiligar umsøkjarar, sum kundu komið upp á tal, um so var.

Sum fyrr nevnt havi eg ikki fortreytir fyri at meta um, hvør er best egnaður til starvið. Men eg haldi tað vera ósakligt at leggja dent á eitt atlit, sum í fyrstu atløgu hevði við sær, at fleiri umsøkjarar vórðu sáldaðir frá, tí dentur samsvarandi starvslýsingini varð lagdur á, at umsøkjararnir skuldu hava hollar arbeiðsroyndir eftir lokna útbúgving, uttan at tað samstundis verður viðgjørt, um hetta eisini kann koma øðrum umsøkjarum til góðar. Í hesum sambandi havi eg eisini bitið merki í, at setanarbólkurin eftir setanarsamrøðuna við A viðmerkti, at tey mettu hana ikki hava so hollar arbeiðsroyndir aftaná lokið prógv samanborið við onkran av hinum umsøkjarunum, ið vóru innkallaðir til samrøðu.

*Gongdin í málinum eftir handan av setanartilmælinum 30. apríl 2015*
Sambært einum uppriti í málinum helt aðalstjórin í Vinnumálaráðnum tað vera óheppið, at semja ikki var um tilmælið, og aðalstjórin vendi sær til uttanríkistænastuna við fyrispurningi um at umhugsa at lýsa starvið leyst av nýggjum. Seinni sama dag tók aðalstjórin í Vinnumálaráðnum avgerð um at fylgja tilmælinum hjá umboðunum í Vinnumálaráðnum við somu grundgevingum og seta A í starv. Í aðramáta finst einki skrivligt tilfar frá viðgerðini av setanartilmælinum.

Tað framgongur av skjølunum, at Vinnumálaráðið upprunaliga ikki metti tað vera rætt, at ráðið einsamalt viðgjørdi, hvør skuldi setast í starv í uttanríkistænastuni. Hetta hevði við

sær, at aðalstjórin í Vinnumálaráðnum tilnevndi tvey umboð frá uttanríkistænastuni í setanarbólkin. Vísandi til hetta, og at úrslitið av viðgerðini í setanarbólkinum er, at ósemja er millum umboðini frá ávikavist Vinnumálaráðnum og Løgmansskrivstovuni, áliggur tað setanarmyndugleikanum ein serlig skyldu til gjølla at viðgera tey ivamál og ósemjur, sum seinna setanartilmælið og skrivliga samskiftið millum limirnar endurspeglar til tess at kunna taka dagar ímillum, hvør er best skikkaður til starvið. Hetta meti eg ikki, at setanarmyndugleikin hevur gjørt.

*Samanumtikið*

Samanumtikið haldi eg, at tað var ein feilur av setanarbólkinum at síggja burtur frá B sum evni til starvið grundað á, at hann ikki hevði eina kandidatútbúgving. Harumframt haldi eg tað vera ósakligt at leggja dent á starvsroyndir í lestrartíðini uttan at aðrir umsøkjarar, sum í fyrstu atløgu vórðu sáldaðir frá, vórðu vigaðir í mun til hetta atlit.

Av tí, at eg ikki haldi, at setanarmyndugleikin hevur givið setanartilmælinum og ivamálum og ósemjum í setanarbólkinum eina veruliga viðgerð, fari eg at mæla Vinnumálaráðnum til at taka málið uppaftur til viðgerðar.

Eg fari samstundis at biðja Vinnumálaráðið um at lata meg frætta úrslitið av hesi viðgerð.

Avrit av hesum skrivi er sent Løgmansskrivstovuni, A og B.

Til tykkara kunnleika skal verða sagt frá, at hetta skriv verður almannakunngjørt á www.lum.fo mánadagin 8. juni 2015 í navnleysum líki.

Vinarliga

Sólja í Ólavsstovu
umboðsmaður